# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Marjun Heimá 85 ár



Mánadagin 24. januar 2005 fyllir Marjun Heimá í Havn 85 ár.

Marjun Heimá er eitt kent navn í samband við handilin við Bernina-seymimaskinum, lýnlásum, knappum o.l.

Marjun er født og uppvaksin í Havn sum nummar 6 av teimum 12 børnunum hjá Poulinu, f. Pálsson, ættað av Tvøroyri, og Jens Paula í Dali, sjómansskúlastjóra úr í Havn.

Marjun hevur frá ungum árum av havt stóran áhuga fyri seyming, og fór hon til Danmarkar at læra til seymikonu á tekniskum skúla.

Hon var í Danmark øll krígsárini og kom heim aftur eftir kríggið og stovnaði sína egnu seymistovu í Havn.

Hon hevur eisini undirvíst í seyming og tilskering í kvøldskúlanum, Tekniska Skúlanum og á Føroya Læraraskúla.

Í 1959 byrjaði hon við egnum handli, sum seldi alt innan seyming og tilskering av klæðum, lynlás, knappar o.l.

Síðan 1960 hevur hon havt umboð fyri tær kendu Bernina-seymimaskinurnar.

Seinnu árini hevur handilin verið partafelag við Marjun og systrini, Ingu Mortensen, sum partaeigarum í P/F Marjun Heimá.

Marjun giftist við Petur, f. Petersen, úr Sørvági. Tey fingu sær eftirnavnið Heimá.

Petur andaðist í 1993, 78 ára gamal.

Marjun hevur altíð verið sera virkin og arbeiðssom, men seinasta árið hevur hon ligið á Pleygudeildini á Landssjúkrahúsinum.

Føðingardagurin verður hildin í KFUK sunnudagin 23. januar frá kl. 16-20.

## Minningarorð um okkara mammu
# Helenu Dragaberg



Nú tað er ein tíð liðin síðan mamma fór heim til Harran, fellur tað okkum ómetaliga tungt at seta seg niður og skriva nøkur minningarorð um okkara høgt elskaðu mammu, sum vit elskaðu yvir alt á jørð og sum so brádliga bleiv tikin heim til Harran alt ov tíðliga, tí vit hildu, at vit høvdu stóran tørv á henni, og hon fylti so nógv í lívi okkara.

Mamma var kjarnan í okkara heimi. Babba arbeiddi hvønn dag, so mamma gekk heima og passaði okkum børn og pápa á ein kærleiksfullan hátt. Mamma var rólig og stillfør, hevði ikki nógv orð um alt, var altíð har tá vit høvdu tørv á henni nær á degnum tað var. Í heim okkara komu nógv fólk, sum børn og vaksin høvdu vit altíð vinir heim við, hon tók við gleði ímóti øllum. Øll vóru góð við mammu okkara, hon var eitt serstakt menniskja, sum øll tóku til sín. Hon var so sjáldsama góð, at tað verður torført hjá okkum at liva upp til hennara.

Mamma okkara upplivdi eisini at fáa 14 ommubørn og eitt langommubarn, sum hon var sera errin av. Hon hevði stóra umsorgan fyri teimum, vildi altíð vita, hvar tey vóru stødd, fóru tey av bygdini, hevði hon samband við tey ella okkum, líka til tey vóru heima aftur. Tað var eisini ein tryggleiki hjá okkum at vita, at okkara børn altíð kundu fara til hennara, tá vit vóru til arbeiðis, tí mamma var altíð inni og sat klár at geva teimum okkurt at eta, tí svong máttu tey ikki ganga, segði hon altíð. Tey vóru so sanniliga eisini góð við ommu sína, tey vistu eisini at hon altíð var klár at taka ímóti teimum við opnum ørmum, so saknurin hjá teimum er sera stórur, nú tey hava mist teirra høgt elskaðu ommu.

Vit vita at hjá tær, góði babba, er saknurin sera stórur, nú tú hevur mist hana, sum tú hevði so kæra, hon var perlan í tínum lívi. Ta seinastu tíðina var tú sera nógv um hana, nú hon var blivin veikari, og passaði hana á ein fyrimyndarligan hátt, var altíð um hana á degi sum á nátt.

Á páskum vóru vit øll heima, og tað dámdi mammu so væl, at øll familjan var savnað saman, bæði børn, svigarbørn, ommubørn og langommubarn, tí tá hevði hon tað best. Vit vóru øll saman kvøldið fyri, at mamma bleiv sjúk, hon var í góðum lag, og vit høvdu eina serstaka løtu saman. Vit síggja mammu okkara fyri okkum, hon sat still og lurtaði, sum hon altíð gjørdi og hevði tíð til, meðan vit prátaðu og sungu. At tað skuldi verða seinastu ferð, vit vóru saman við henni, varnaðust vit ei, tí somu nátt bleiv hon sjúk, og samband fingu vit ikki við hana aftur. Hon doyði bert tríggjar dagar eftir.

Tað kom eisini fram í taluni við jarðarferðina hjá mammu, hvussu gott menniskja hon var. Har blivu so sanniliga nógv góð orð søgd um okkara høgt elskaðu mammu og eisini tøkk til tann stóra skara, sum vísti okkum samkenslu við at koma at fylgja henni til hennara seinasta hvíldarstað her á jørð.

Mamma góða, saknað verður tú ómetaliga nógv, tað er so svárt at góðtaka, at tú ikki ert ímillum okkum meira. Tað er so tungt at koma til babba, nú ongin mamma situr har. Tín stólur stendur nú tómur, men vit vita, at tú hevur tað betur nú, og at vit øll ein dag skulu síggjast aftur, vit sum trúgva á hann, ið øllum ræður.

Góða mamma, takk fyri alt tú var fyri okkum her á fold.

Harrin styrki teg, babba, og okkum øll víðari fram í lívinum.

Ærað veri minnið um okkara høgt elskaðu mammu.

*Aldri tey sum Harran kenna*
*Hittast skulu síðstu ferð,*
*Tá ið tár við skilna renna*
*Troyst í hesum orðum er.*

**Óla Jákup, Elisabeth,**
**Anna Sofía og Daisy**

## Minningarorð um okkara høgt elskaðu ommu og langommu
# Helenu Dragaberg

*Eina seinastu heilsan frá okkum tú fært*
*tú sum hevði okkara hjarta so kært,*
*vit ei skilja tað sum hendir her,*
*at tú ei millum okkum longur er.*

*Omma góða tú var okkum so kær,*
*vildu ynskt at tú vart okkum nær,*
*men tað ein troyst hjá okkum tó er,*
*at tú betur hevur tað, har sum tú nú er.*

*Ein kærleiksfull omma tú var,*
*títt hjarta hugsaði um alt,*
*vit vita at ein eingil tú nú er,*
*og ansar okkum í hesari verð.*

*Vit bestu ommu hava átt,*
*lýsti tá vit komu inn á gátt,*
*tú tók okkum øll inn at tær,*
*vit sum vóru tær so kær.*

*Vit vilja tær takka fyri alt,*
*fyri tað tú gjørdi og vart,*
*minnini um teg vit vilja goyma,*
*og aldri vit teg fara at gloyma.*

**Ommubørnini og langommusonurin**

# Tøkk

Hjartaliga tøkk tit sum mintust meg á føðingardegnum við vitjan, gávum, blómum, telefonsamrøðum og fjarritum.

**Heilsan**
**Steingrím Joensen, Argjaboða**

†

Gjørt verður kunnugt fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara høgt elskaða

**Hjørdis Christiansen**
*Tórshavn*
fødd Lamhauge, ættað úr Rituvík

andaðist hósmorgunin 20. januar á Ríkissjúkrahúsinum, 77 ára gomul.

Kistan kemur í Havnar kirkju sunnukvøldið klokkan 18.

Jarðarferðin verður týsdagin klokkan 13.

*Familjunnar vegna*

**Poul**
**Marita, Suni og Kirstin við familjum**